


www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 06 - 2012

# Clapton brunnurin eitt vónbrot

Hóast Clapton brunnurin var so gott sum turrur, so fekk Faroe Petroleum týðandi upplýsingar burtur úr boringini, sum felagið fer at brúka í víðari metingunum. Hettta sigur Graham Stewart, stjóri í Faroe Petroleum, nú tað ikki eydnaðist at gera nakað lønandi oljufund í fyrsta brunninum á norskum øki, har Faroe Petroleum er fyristøðufelag. Kolvetni vóru staðfest í brunninum men ikki í teimum nøgdum, sum metingarnar vístu. Faroe Petroleum eigur 40% av brunninum, meðan Dana Petroleum eigur 20%, Lundin 18%, Noreco 12% og Det Norske Oljeselskab 10%. Faroe Petroleum borar í løtuni tveir aðrar brunnar. Anner er Cooper í Norðsjónum, har felagið hevur 30%. Hin er North Uist, har felagið eigur 6,3%. Stórur spenningur er um hesar brunnar og verður úrslitið av Cooper greitt um einar tvær vikur. Hin brunnurin, North Uist verður boraður vestan fyri Hetland, skamt frá føroyska markinum. Har er BP fyristøðufelag og eru stórar vónir til henda brunnin, ið er tann fyrsti á djúpum vatni hjá BP, síðani vanlukkuna í Meksikanska flógvanum. Faroe Petroleum sigur annars um boringina í tíðindaskrivi - Borað varð niður á leitimiðið á 2.619 metra dýpi. Farrar av olju vóru tó at finna í boringini, men jarðgoymslan var tynnri og góðskan ikki eins góð sum mett varð undan boringini. Upplýsingar og royndir frá boringini eru fingin til vega. Brunnurin er nú typtur og fráfarin. Brunnurin er tann fyrsti, sum Faroe Peroleum borar sum fyristøðufelag í Noregi. Mærsk Guardian boripallurin varð nýttur, meðan Sæborg, sum føroyska reiðaríið Supply Service eigur, var veitaraskip. Kostnaðurin av boringini varð innanfyri kostnaðarmetingina, og onki óhapp hendi undir boringini. Clapton leitimiðið er á loyvi PL440S, umleið 5 km eystanfyri Eldfisk framleiðslueindina og 10 km norðanfyri Valhall framleiðslueindina. Sjálvt um úrslitið av Clapton boringini er skuffandi, so eru upplýsingarnir, sum eru fingnir góðir, og grundarlag er fyri at gera fleiri